# Vørumessan ger tað lættari hjá teimum sum skulu keypa

VØRUMESSAN 2003
*Vilmund Jacobsen*

Vørumessan er ikki alenn, men er serliga ætlað handilsfólki og fólki, sum umboða stovnar og fyritøkur av ymiskum slagi.

- Vanligt hevur verið, at heilsølur og onnur, sum sýna fram á messuni, bjóða sínum viðskiftafólkum at koma á vitjan, og soleiðis er eisini í ár. Aftrat hesum hava vit hesaferð sent út innbjóðingar til flestu fyritøkur í Føroyum. Hetta hava vit ikki gjørt áður, sigur Birgir Poulsen.

Endamálið við Vørumessuni er at gera tað lættari hjá handilsfólki, stovnum, fyritøkum og øðrum at keypa sínar vørur og tænastur, sum eru tøkar á føroyska marknaðinum.

Birgir Poulsen, stigtakari, sigur, at flestu heilsølur í landinum eru við á messuni, og tær hava nógv góð tilboð at bjóða sínum viðskiftafólki. Millum aðrar kunnu nevnast Poul Hansen, Poul Michelsen, Landshandilin, Kjølbro, Damfar og Norðvág – tær báðar seinastu við góðgæti.

## Góð keyp

- Tað er vanligt, at heilsølur og framsýnarar annars hava nógv góð tilboð á Vørumessuni. Fleiri taka nýggjar vørur heim júst í samband við messuna, og viðskiftafólk kunnu gera rættiliga góð keyp.

Stigtakarin sigur, at nógv verður "handlað" á messuni, og tað eru teir handilsmenn, sum gera avtalur um keyp av ávísum vørum yvir eitt heilt ár.

Men tað eru ikki bara matvørur og góðgæti, sum verða handlaðar á Vørumessuni.

- Innan telduútbúnað og heimasíður, hava vit tvær fyritøkur úr Saltangará, Tera og Krea. Tera hevur nøkur ár á baki, meðan Krea er ein nýggj fyritøka við ungum, ágrýtnum og evnaríkum monnum, sum serliga arbeiða við heimasíðum, sigur Birgir.

Hann vísir á, at ein fyritøka, sum fyrstu ferð var við í fjør og aftur er við í ár, er Multikeyp í Havn, sum ger reklamulutir.

- Her kanst tú bíleggja pennar, fløgg og ymiskar lutir við navninum ella búmerkinum hjá tíni egnu fyritøku. Hetta er slíkt, sum stovnar og fyritøkur av ymiskum slagi lata sínum viðskiftafólki við ymisk høvi.

Av nýggjum framsýnarum, sum eru við í ár, sigur Birgir, er eitt nú Ergo-og Hjálpitól, sum selir nógvan útbúnað til stovnar og skrivstovur. Haraftrat er so eisini blómuhandilin, Orkis á Glyvrum, sum í fyrsta lagi tekur sær av torginum.



*Frá Vørumessuni 2002*

## Sent innbjóðingar

- Vørumessan er ikki almenn, men er serliga ætlað handilsfólki og fólkum, sum umboða stovnar og skrivstovur av ymiskum slagi.

Birgir sigur, at vanligt hevur verið, at heilsølur og onnur, sum sýna fram á messuni, bjóða sínum viðskiftafólkum at koma á stevnuna, og soleiðis er eisini í ár.

- Men aftrat hesum hava vit, sum taka stig til stevnuna, í ár sent út innbjóðingar til flestu fyritøkur í Føroyum. Hetta hava vit ikki gjørt áður, so spennandi verður at síggja, um hetta fer at veksa um talið av vitjandi.

Hann vísir á, at vanliga plaga eini 1500-2000 fólk at vitja á Vørumessuni.

- Framsýnarar eru ógvuliga fegnir um Vørumessuna, og tað eru ikki so fáir, sum siga, at messan gevur teimum ta eykaíkast sum skal til – eitt íkast, sum hesar fyritøkur treyðugt kunnu umvera, sigur Birgir.

## Tilboð á messuni

Hann sigur, at fleiri vitjandi eru á stevnuni allar tríggjar dagarnar og afturmeldingin, ið tey, sum stigtakarar fáa, er, at Vørumessan hevur stóran týdning fyri handilslívið og annars øll tey, sum keypa vørur og tænastur.

- Útboðið er so mikið stórt, at tað tekur sína tíð hjá teimum vitjandi at síggja alt, sum hevur teirra áhuga. Fleiri tilboð eru bara galdandi á sjálvari messuni; tí er umráðandi at fáa avtalurnar uppá pláss, meðan stevnan er, sigur Birgir Poulsen.


Alt til persónliga trygd

Handskar
Trygdarskógvar og -stivlar
Regn- og oljuklæðir
Vatntættar termodraktir
Arbeiðsklæðir
Kitlar
Undirklæðir
Trygdarhjálmar
Oyravernd
Maskur

VIT ERU Á BÁSI 29



Sp/f
ADC-Heilsølan
Láarvegur 14 • 100 Tórshavn • tel 315828 • fax 315893
heimasíða: www.adc.fo • teldupostur: adc@adc.fo



JOHN's RESTAURANT
Saltangará - Tel/fax 448690

Vit standa fyri matinum á Vørumessuni 2003
sum verður í Havn frá 19. september
til 21. september

Vit kunnu bjóða:
Kaffi
The
Sodavatn
Smyrjibreyð
Køku
Døgurða
Dessert
Og mangt annað...



Møguleiki er eisini fyri morgunmati, men hesin skal tó bíleggjast kvøldið fyri.

Heimagjørdur matur:
Sunnudagin 21. september frá kl. 12.00

John's Restaurant í Saltangará er
stongd frá hósdegnum kl. 16.00 til mánadag kl. 11.30

Vælkomin á Vørumessuna







kom....
og ger okkurt annað?

Hví fara tungu leiðina út á kaina eftir vøruni - fáa skil á pappír -koyra vøruna heim, tá vit kunnu bjóða goymslu og koyring, bæði til tín og til tíni viðskiftafólk á Vøruhotellinum?
Kom á vørumessuni á Hálsi tann 19. - 20. september og fáa meira at vita um, hvussu tú sparir bæði tíð og pengar við at brúka Vøruhotellið.

Greið leið EIMSKIP

STEPHANSSONS HÚS